Heðin og Edmund ógvuliga stuttmintir

Tað eru ikki meiri enn tvey ár síðani at teir báðir sjálvir royndur at forða einum løgtingsmanni í at seta einum landsstýrismanni ein fyrispurning

POLITIKKUR
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Edmund Joensen og Heðin Mortensen eru tveir ógvuliga gloymskir løgtingsmenn.

Tað halda eygleiðarar, sum fylgja væl við í tí, sum Løgtingið fæst við.

Í farnu viku funnust teir báðir hvassliga at Bill Justinussen, tí hann royndi at forða Heðini Mortensen í at seta ein spurning fram í tinginum um viðvíkahald á Landssjúkrahúsinum.

Fyri at sleppa at seta ein fyrispurning fram, skal Løgtingið samtykkja tað.

Báðir vístu teir á, at tað vanliga hevur verið, at tingið, uttan atkvøðugreiðslu hevur samtykt, at ein spurningur skal svarast.

Edmund Joensen, løgtingsformaður, segði tá við Sosialin, at tað brýtur heilt frá vanligari siðvenju, at tingið atkvøðir um ein fyrispurning.

Tað fer soleiðis fram, at løgtingsformaðurin spyr tinglimir, um nakar hevur nakað ímóti, at ein fyrispurningur verður svaraður. Ongin plagar at muta ímóti og so staðfestir tingformaðurin, at tingið hevur samtykt, at fyrispurningurin skal svarast-

Men tá ið Heðin Mortensen ætlaði at spyrja Bill Justinussen um Landssjúkrahúsið, bað Óli Breckmann um at atkvøtt var í málinum.

Tá hendi tað, at Charlotta á Váli Olsen úr Miðflokkinum atkvøddi ímóti og Hergeir Nielsen og Heini O. Heinesen, atkvøddi blankt.

Løgtingsformaðurin segði tá við Sosialin, at hetta er fyrstu ferð hesi sjey- átta árini, hendan skipanin hevur verið í gildi, at løgtingslimur atkvøðir ímóti, at ein fyrispurningur verður settur fram.

– Eg helt, eg hoyrdi yvir meg, tá ið Óli Breckmann bað um at tingið atkvøddi um, antin Heðin Mortensen skuldi sleppa at seta spurningin fram, so eg mátti spyrja uppaftur, sigur Edmund Joensen.

Eisini Heðin Mortensen vísti á, hvussu sjáldsamt tað er, at tað skal atkvøðast um ein fyrispurning.

Gloymskir

Men politiskir eygleiðarar siga, at so øgiliga sjáldsamt er hetta nú heldur ikki.

Teir siga, at tað eru ikki meiri enn tvey ár síðani, at tingmenn eisini bóðu um at atkvøðugreiðslu um ein fyrispurning til ein landsstýrismann.

Og tá atkvøddi bæði Edmund Joensen og Heðin Mortensen ímóti at fyrispurningurin skuldi svarast. Fleiri aðir tinglimir atkvøddi eisini ímóti.

Tá var tað Sámal Petur í Grund, sum ætlaði at spyrja Tórbjørn Jacobsen, sum tá var landsstýrismaður í mentamálum, um Sjónvarp Føroya metti allar politikarar eins, og um nakrar reglur eru fyri, nær ein politikari sleppur framat mikrofonini hjá sjónvarpinum.

Hetta gjørdi hann í samband við, at Nato- málið var til viðgerðar. Hergeir Nielsen hevði havt sínar viðmerkingar í Degi og viku. Men eftir sendingina "grannar okkara", var dagur og vikar, so at siga tikin uppaftur og tá slapp Jóannes Eidesgaard framat at siga sína hugsan, sum gekk ímóti tí, sum Hergeir Nielsen hevði sagt.

Sámal Petur í Grud helt, at hetta mundi vera eindømi í søguni hjá SvF og tí setti hann spurningin fram. Hetta var fyrispurningur nummar 100- 47 frá 2000.

Tað endaði kortini eisini við, at spurningurin skuldi svarast, tí 15 tinglimir atkvøddi fyri, 3 atkvøddu blankt og 9 atkvøddi beinleiðis ímóti- og herímillum vóru altso væði Heðin Mortensen og Edmund Joensen, løgtingsformaður. Leggjast kann afturat, at allir sambandsmaður atkvøddu ímóti, at spurningurin skuldi svarast, uttan Marjus Dam- men hann var burturstaddur.

Atkvøðugreiðsla nr: 128/2000 — Løgting Føroya, 100 Tórshavn

ATKVØÐULISTI — 15.02.2001 13.44.45

Mál nr: 999.00/2000
Test mál

Viðgerð nr: 1
Fyrispurningur nr. 100-47/2000

Tal	Navn	Tast.nr	J	x	N	-	Bu
8	Fólkaflokkurin						
1	Rúna Sivertsen	15					-
2	Jógvan við Keldu	17	Ja				
3	Óli Breckmann	13	Ja				
4	Jógvan á Lakjuni	12	Ja				
5	Jóanis Nielsen	11	Ja				
6	Eyðun Viderø	10					-
7	Ingi Olsen	20	Ja				
8	Finnbogi Arge	14	Ja				
6	Sambandflokkurin						
1	Flemming Mikkelsen	25			Nei		
2	Marjus Dam	31					-
3	Alfred Olsen	29			Nei		
4	Heðin Mortensen	30			Nei		
5	Lisbeth L. Petersen	28			Nei		
6	Edmund Joensen	27			Nei		
7	JAVNAÐARFLOKKURIN						
1	Katrin Dahl Jakobsen	23			Nei		
2	Jóannes Eidesgaard	24			Nei		
3	Henrik Old	22		x			
4	Dan R. Petersen	21			Nei		
5	Vilhelm Johannesen	16					-
6	Kristian Magnussen	18		x			
7	Hans Pauli Strøm	19			Nei		
2	SJÁLVSTÝRISFLOKKURIN						
1	Jákup Sverri Kass	2	Ja				
2	Sámal Petur í Grund	3					-
8	TJÓÐVELDISFLOKKURIN						
1	Signar á Brúnni	32	Ja				
2	Finnbogi Ísakson	1		x			
3	Jógvan Durhuus	4	Ja				
4	Heini O. Heinesen	5	Ja				
5	Hergeir Nielsen	8	Ja				
6	Páll á Reynatúgvu	9	Ja				
7	Annita á Fríðriksmørk	7	Ja				
8	Finnur Helmsdal	6	Ja				
1	MIÐFLOKKURIN						
1	Jenis av Rana	26	Ja				
32	Samanlagt		15	3	9	0	5

ORIGINAL NR. 2

Hetta er atkvøðuseðilin, sum vísir, hvussu tinglimir atkvøddu, tá ið Sámal Petur í Grund ætlaði at spyrja Tórbjørn Jacobsen tveir spurningar um sjónvarp Føroya. Sum tað sæst, atvøddu allir fimm sambandsmenninir, sum vóru til staðar, ímóti, har ímillum bæði Heðin Mortensen og Edmund Joensen

Broyttar reglugerðir næsta ár

Sum vænt verður tiltakið "Ársins Songrødd" aftur á skránni komandi ár. Men hesu ferð tá ið Føroya størsta songkapping fer fram, verður tað við stórum broytingum hvat úrvalið av sangum viðvíkur.

ÁRSINS SONGRØDD 2004
tíðindaskriv

Tað verður nevniliga sum áður, ikki eitt avmarkað úrval av sangum at velja ímillum, ei heldur et tað ein treyt, at tað skal vera ein nýggjur sangur sum ein syngur. Nú ber til at velja sær ein sang líka mikið í hvørjum katagori tað er í, samstundis sum tað bæði kann vera eitt nýtt ella eitt gamalt lag.

Einasta treytin er , at tað bert er hetta eina lagið við í allari kappingini og tað er á enskum (ikki Føroyskt lag). Tvs. at um ein hevur teknað seg til kappingina og valt sær t.d. "Let it be" hjá Beatles kann onkur annar ikki velja hetta lagið eisini.

Tað skal viðmerkjast, at grundin til at Føroysk løg ikki eru við, er tí at tey ikki finnast í databasanum hjá leverandøri. Men um ein ætlar sær við í kappingina og kann framskaffa eitt sokallað "Singbackvertión" sjálvur, er viðkomandi sjálvsagt vælkomin at luttaka, og sama er eisini galdandi um luttakari ynskir at syngja eitt heimagjørt lag. Treytin er í báðum førum, at tað verður útvega á fløgu í nóg góðari góðsku sum skal góðtakast av fyrireikaranum.

Undanumførini av Ársins Songrødd 2004 kappingin verður:

Í Roynhøllini í Hvalba (Suðuroy, Sandoy)

Í Høllini á Nabb (Streymoy, Vágar) 2 umfør

Í Høllini á Kambsdali (Eysturoy, Norðuroyggjar) 2 umfør

Finalan verður í høllini á Nabb.

Ársins Songrødd 2004 byrjar síðst í jan.2004.

Spurningar kunnu sendast til:

spurningar@songroddin.com

Hundarnir hava betri rætt enn børnini

Tað er ikki loyvt at skjóta ein hund, sum stendur og bítur eitt barn. Er talan hinvegin um, at hann bítur ein seyð, kann hann skjótast, sigur sýslumaðurin í Vágum

HUNDAÓSKIL
Edvard Joensen
edvard@sosialurin.fo

Vágar:
Hundarnir tykjast hava betri rættindi á vegnum, enn børnini hava. Soleiðis má lógin skiljast, sigur Regin Jespersen, sýslumaður í Vágum. Hann harmast um, at ov lítið skil er á hundahaldi í oynni.

Leysir hundar eru ein trupulleiki víða um landið. Um dagarnar var ein søga at síggja í Sosialinum um ein smádrong, sum varð illa bitin av einum hundi. Og tað er ikki nakað eindømi heldur. Tað hendir alt ov ofta, at bæði fólk og fæ verða skambitin av leysum hundum.

Og eisini á annan hát kunnu leysir hundar vera orsøk til óhapp, sum væl kunnu enda í reinum vanlukkum.

Fyri stuttum var ein leysur hundur í Miðvági orsøk til eitt ferðsluóhapp, sum lættliga kundi endað verri, enn tað gjørdi, um illa vildi til.

Tvær motorsúkklur komu koyrandi gjøgnum bygdina, og møttu einum bili, sum kom í mótgangandi breyt. Knappliga er ein leysur hundur fyri bilinum, sum bremsar. Tann fremra motorsúkklan bremsaði eisini, men tann aftara klráði hvørki at bremsa ella koyra rundan um hina, so tær bóru saman og koppaðu.

Fararin á aðrari motorsúkkluni varð fluttur á Landssjúkrahúsið til kanningar, men slapp tíbetur frá óhappinum uttan mein, greiðir sýslumaðurin frá.

Men hatta er bara eitt dømi av fleiri, siga fólk í Miðvági, sum ilskast almikið inn á hesar leysu hundarnar, sum dag og daglia strúka um geilarnar.

– Tað er so galið, at børnini aftra seg við at fara út, sigur ein kelda við Sosialin. Tey tora snøgt sagt ikki at ganga eftir ávísum vegastrekkjum í Miðvági, sigur hon. Tey verða umgyrd av trimum-fýra leysum hundum, sum nálgast uppi á teimum. Og eingin veit, hvør endin kann verða. Gerast børnini bangin og gera eitthvørt óvæntað, kann hundurin eisini gerast bangin, og so bítur hann.

Hundar hava als ikki lovyi at ganga leysir, uttan at eigarin hevur fult ræði á teimum. Kortini eru slíkir ein stórur trupulleiki nógvastaðni, og trupult tykist vera at fáa gjørt nakað við tað
Tilvildarlig savnsmynd

Hundarnir góð rættindi

Sýslumaðurin í Vágum, Regin Jespersen, ásannar trupulleikan og sigur, at hann er ikki so lættur at loysa, sum ein kundi hidlið. Tað er lógarverkið, sum er soleiðis háttað, at tað viðhvørt kann tykjast bæði trupult og undarligt.

– Tú kanst skjóta ein hund, um tú kemur fram á hann, meðan hann er í ferð við at bíta ein seyð, sigur sýslumaðurin. Men tað ber ikki til, um tað er eitt fólk, hundurin er í ferð við at bíta, sigur hann.

Hví tað er so, dugir hann ikki at greina nærri, men soleiðis er lógarreglan, sigur hann.

Og tað ber ikki til at fara eftir einum hundi, tú hevur sað gera seg inn á annaðhvørt heiði ella kristi, og uttan viðari skjóta hann, tá tað eydnast at fáa hendur á hann. Tað skal meldast til løgregluna, sum saman við boðunum eisini skal fáa at vita, hvør eigur hendan góða hund.

Eisini her er tað so, at hundarnir hava betri rættindi enn fólk. Tí taka vit til dømis ein persón, sum verður meldaður fyri at koyra rúsdrekkaávirkaður, kann hann ákærast fyri hetta, um hann verður funnin ávirkaður eitt heilt sjóvarfall eftir, at hendingin skal vera farin fram.

Tungt at loysa

Lokalt tykist málið um leysgangandi hundar í Vágum eitt sindur trupult at loysa, sigur sýslumaðurin.

Avgjørt er fyrr at seta ein kommunalan hundafangara. Bæði í Miðvági og Sandavági, eins og tað eisini hevur verið frammi í Sørvági.

Men tað sær út til, at hetta er eitt yrki, sum eingin líkasum hevur hug at taka á seg.

– Tað kundi verið líkt til at her eru fólk bangin fyri at koma at ganga onkrum ov nær, og tað vilja tey helst sleppa undan, heldur Regin Jespersen, sýslumaður.

Og sama skilið er, um fólk síggja ein hund ger eitthvørt. Tey eru ikki serliga hugað at siga løgreglúni frá, sum gerast skal, um ein leysur hundur ger eitthvørt ólógligt.

Hinvegin ásannar sýslumaðurin eisini, at tað viðhvørt kann vera trupult at finna eigaran, um løgreglan ikki kennir hundarnar. Tí tað eru verri enn so allir, sum ganga við hundatekini, sum eisini eigur at vera. Háost tað, at hundurin eigur at vera bundin, ella at eigarin eigur at hava fult ræði á honum.

Fleiri og fleiri sanna tað, sum ein bygdarráðslimur í eini minni kommunu í landinum segði á almennum fundi herfyri:

– Hjá okkum er tað nú soleiðis vorðið, at høsn og hundar, seyður og ross og alt slíkt hevur loyvi at ganga leyst og skíta og tiggja sær, sum tey vilja. Tað eru bara børnini, sum eru innihegnað.

Hetta lambið í Sørvági varð so illa hundbitið, at tað doyði av tí. Hetta er heldur einki eindømi
Mynd: Edvard Joensen

bixin
Nýggjur barnahandil letur upp 22. november
Niels Finsensgøta 7 – Telefon 32 28 28